# Double up í singer/songwriter

**Kári Páll Nolsøe og Jóannes Lamhauge sungu seg í singer/ songwriter finaluna**

SINGER/SONG-WRITER
*Tíðindaskriv*

Tað var ikki sørt av spenningi í luftini, tá minuttirnir spakuliga rullaðu framvið hálvgumtíggju leygarkvøldið. Hafnia Lounge var annað leygarkvøld á rað stúgvandi fult av fólki. Hetta seinna innleiðandi umfarið tóktist vera rættiliga opið viðvíkjandi, hvør kundi kallast favorittur.

Ein hálvan tíma seinkað byrjaði Jógvan A. Jacobsen kappingina. Hann var tann einasti av luttakarunum leygarkvøldið, sum hevði roynt seg í kappingini í fjør. Tað var hugvekjandi at síggja, hvussu hann tóktist tryggari við sína framførslu í ár. Hann hevur eina sterka rødd, sum hann hevur gott tak á.

Ragnar í Vík hevur somuleiðis gott tak á sínari rødd. Hann var kanska kendasti luttakarin leygarkvøldið, men samstundis kanska nakað ókendur í singer/songwriter høpi. Hann var síðstur at spæla, og fólk fingu at hoyra country tónleikin, hann er kendur fyri. Serliga slap hann væl frá sanginum ognaðum konu sínari.

## Inniligt undirhald

Sum ávíkavíst nummar tvey og trý fóru Jóannes Lamhauge og Kári Páll Nolsøe á lítla pallin. Hesir báðir megnaðu báðir at syngja seg víðari í kappingini. Men tað verður so sanniliga ein fjøllbroytt finala: Stílurin hjá teimum eru øgiliga ymiskir.

Kári undirhelt í stórum stíli og dugdi væl at fáa áhoyrarnar at kenna seg væl. Hann spældi nógv við orðunum og kláraði væl at fáa sín boðskap fram í meldiøsu sangunum hjá honum.

Jóannes Lamhauge sang meira bleytt og inniligt. Tað var rørandi at hoyra hann syngja leygarkvøldið. Tað var týðuligt, at tað búði nakað veruligt aftan fyri orðini hjá honum.

Dómararnir hildu so nógv um teirra framførslu, at teir báðir tveir sleppa at vera við finaluni.



*Kári undirhelt í stórum stíli og dugdi væl at fáa áhoyrarnar at kenna seg væl*

## Útlendskir dómarar

Nakað heilt serligt við innleiðandi umfarinum leygarkvøldið var, at dómarar vóru úr øðrum londum enn úr Føroyum. Umframt dómarar frá FUT vóru eisini umboð fyri svenska tjóðpallin dómarar. Útlendsku dómararnir vóru í Føroyum í øðrum ørindum og tóku beinanvegin av møguleikanum at døma leygarkvøldið.

Svensku dómararnir høvdu á orði, at støðið í kappingini var nógv hægri, enn teir høvdu gitt sær til.

Eitt annað útlendskt innslag leygarkvøldið kom heilt úr Senegal. Ein av luttakarunum í Crossroads tiltakinum í Norðurlandahúsinum undirhelt við einum heilt serligum ljóðføri: einum graskari við einogtjúgu streingjum. Fólk tóku sera væl ímóti hesum fremmanda tónleiki.

## Finalan komandi vikuskifti

Finalan í ársins singer/songwriter kapping verður longu komandi vikuskifti. Tá sleppa fólk aftur at hoyra Kára Páll Nolsøe, Jóannes Lamhauge og vinnaran av fyrra innleiðandi umfarinum, Rók Jakobsen. Hetta er aðru ferð, at Hotel Hafnia fyriskipar singer/songwriter. Í ár er tað í samstarvi við Heineken, og Atlantic Airways stuðlar kappingini. Útvarp Føroya tekur upp og sendir brot frá kappingini. Ì mun til í fjør er áhugin fyri kappingini millum manna rættiliga nógv voksin, og Hafnia Lounge verður væntandi á tremur við fólki til finaluna leygarkvøldið kl. 22.00.

# Níggjunda novembers-operettan

TING-HELLAN

TINGHELLUKLUMMAN
*Jóanes Nielsen*



10 november var ein margháttligur dagur. Heilt frá morgunstundini skaraði dagurin framúr, og fyrst og fremst takka veri stóra operettufigurinum í føroyskum politikki, Heðini Mortensen. Við at leypa frá eini skriftligari avtalu við Jan Christiansen, sum man annars kann tittulera serfrøðing í brotnum byggisamtyktum, hevur Heðin Mortensen á sín egna hátt nullskriva okkara politiska kalendara. Man kann eisini siga, at maðurin av nýggjum hevur lært sínar medborgarar tað politiska ABC'iði. Nevniliga: Bara eitt slag av kærleika finst í politikki, eginkærleiki!

Fyrstur av vísa Heðini Mortensen sína andstygd, var flokksfelagin Høgni Mikkelsen. Umframt at hava gaffla sær nøkur góð byggilendi, hvørji onnur ørindi hevur tann fýrurin havt í Býráðnum? Maðurin sum hevur bygt tær ljótastu lonirnar í Tórshavnar søgu, og tjent milliónir uppá kassarnar, og sum omaná tað heila er valdur inn í býráðið sum eitt slag av ambassadørið hjá teimum heimleysu, luftaði í Útvarpinum tað rættiliga orginala, men djúpt hykleriska sjónarmiðið, at Sambandsflokkurin altíð hevur veri ein erligur flokkur.

Honum á bakið kom Kai Leo Johannesen við síni ræðuligu sunnudagsskúlalærararødd. Møguliga er maðurin ein infantil sál, og tað hevur hann eisini loyvið at vera. Men Sambandsflokkurin er hóast alt ein vaksnamannaflokkur, og tað minsta man kann krevja av flokksins fremsta umboði, er at viðkomandi nýtir ein hóskandi vaksnamannamálburð. Tað ber til at brutalisera og korrumpera politikkin. Men ein meldar púrasta pass, tá menn byrja at barnsliggera politikkin.

Eisini Kaj Leo Johannesen var skelkaður av Heðini Mortensen, og hevði hann ikki havt so nógvar lyklar og leysar pengar í lummunum, var hann helst farin á flog av berari helligheit. Maðurin bleiv við at tosa um at halda avtalur og um at uppæla børnini til erligheit, og við so himmalvendum eygum, at eg illtonkti mannin fyri at bluffa. Og sumt bendir á, at tað er akkurat tað sum hann hevur gjørt. Í øllum førum pástendur Heðin Mortensen, at formaðurin í Sambandsflokkinum visti um alt sum gekk fyri seg náttina aftaná býráðsvalið. Bæði um samráðingarnar við Fólkaflokkin, og eisini um tær seinni samráðingarnar við Tjóðveldisflokkin og Javnaðarflokkin. Spurningurin er so hvørjum teirra man skal trúgva.

Í sjónvarpinum 10. november, sóu vit Heðin Mortensen berjast fyri sínum politiska lívið. Vandin fyri eksklusjón úr Sambandsflokkinum hekk yvir hansara høvdi, og uttan iva kendi hann til royndirnar hjá Jan Christiansen at triksa bæði javnaðarumboðini yvir í sín part, og hevði tað lukkast, ja, so var Heðin Mortensen liðugur í politikki. Kanska høvdu teir valt hann til formann í líksýnisnevndini, ella inn í nevndina sum hevur umsjón av kirkjuklokkunum í býnum. Okkurt sovorðið. Tí spældi Heðin Mortensen høgt spæl, og skjeyt frá mjødnini. Hann trúði ikki rættiliga uppá at Jan Christiansen hevði so ilt í sínum politiska hjarta, sum hann lætst til at hava. Tvørturímóti minti hann á sokallaða kvettið sum var framt móti Lisbet L. Petersen fyri átta árum síðani, og pástóð at tað nettup var Jan Christiansen sum var meistarin aftanfyri komplottið.

Men ein skilur væl at Jan Christiansen er harmur um at hava mist borgmeistarasessin. Var eg í hansara støðu, hevði eg heldur ikki hvept meg við at hunddálka Heðin Mortensen. Bæði tí hann leyp frá eini skriftligari avtalu, men eisini tí tær 50.000 krónurnar sum borgmeistarin fær um mánaðin, helst eru meiri enn tað sum fitnesstøðin Yviri við Strond kastar av sær.

At eginkærleiki í politikki stingur djúpt, minnist eg frá løgtingsvalinum í 1978. Vit vóru ein bólkur av ungum fólkið sum av okkara eintingum hongdu valplakatir upp. Hvat vit agiteraðu fyri, minnist eg ikki rættiliga, allarhelst hava vit agitera ímóti onkrum. Men akkurat ta náttina ýddi býurin av idealistiskum flokksstuðlum sum límaðu og nelgdu fyri sínar flokkar. Jógvan Arge, sum var valevnið hjá Tjóðveldisflokkinum, var eisini í býnum ta náttina. Men hann hongdi ikki plakatir upp fyri flokkin. Jógvan Arge límaði og nelgdi fyri seg sjálvan, og at hjálpa sær hevði hann brøðurnar Ólav og Magna.

Men aftaná 9. november í ár gjørdu nettup Jógvan Arge og Heðin Mortensen sítt til at politiska senan í Havn broyttist til eina operettusenu. Ja, meiri enn tað, til eina operettufarsu, har hvør einasta replikk hevði dupultan týdning, og onki í veruleikanum var sum tað tóktist at vera. Allir býráðslimirnir tosaðu úr løgnum handritum, sum ongin hevði copyrættindi til. Tað sum eina avmarkaða løtu var sannleiki, bygdi næstu løtuna á eina misskiljng, sum aftur bygdi á eina aðra misskiljing. Tað einasta sum man kann vera glaður um, var at Miðflokkurin ongan býráðslim fekk, tí viðkomandi hevði uttan iva farið og vrøvla í tungum. Innan fyri nakrar og tredivu tímar vóru heili fýra samgonguskjøl skrivaði, og afturat skjølunum fylgdu dungar av illgitingum og útspillingum sum hoyrdust í Útvarpi og Sjónvarpi, og vóru at lesa í bløðunum.

Tað er ikki heilt burturvið at pástanda, at soleiðis sum flokkspolitiska uppstillingin hevur útvikla seg, og ikki bara tá talan er um bý- og bygdaráðsval, men eisini til løgtingsval, so er undirhaldsvirði vorðið valsins fremsta eyðkennið. Logiska fylgjan av tí pástandinum má neyðugvís vera, at so er operettufigururin Heðin Mortensen eitt av hæddarpunktunum, ella sjálv krúnan á flokkspolitiska uppstillingaverkinum. Og tað er akkurat tað, sum maðurin er. Tá hjúnini Mortensen mikukvøldið løgdu seg at sova, var Heðin ein skroypilig sambandsk ormvera, men tá konan vendi sær móti honum næstan morgun, hvat sá hon? Jú, ein fagran sosialdemokratiskan summarfugl við sína lið.

Men hvar blivu so allar hugsjónirnar og hjartamálini av í hesi veldugu operettufarsu? Til tað vil eg siga, at borgararnir í Havn í øllum førum høvdu eitt hjartamál, og tað var at gera kvinnurnar sjónligari í býráðspolitikkinum. Og tað eydnaðist. Annars hvurvu hjartamálini sum døgg fyri sól, og man skuldi hava rættiliga góð eygu fyri bara at hóma skuggan av eini hugsjón.

Tað er komið somikið langt í dag, at politikarir kenna seg ikki sum fólksins tænarir. Mín varðhugi er eisini at fólk hálvavegna hveppa seg við at krevja, at teir fyrst og fremst skulu vera loyalir móti býnum og landinum. Teirra loyalitetur er knýttur til politisku flokkarnar, og tað merkir í høvðusheitum til tað klikuna sum situr við valdinum. Flokkspolitiska uppstillingin veitir heldur ikki veljarunum trygd fyri, at tey sum koma upp á listarnar, eru flokksins frægastu umboð. Heldur er tað øvugt. Tað eru kraddini, tey sjálvsøknu og ikki serliga gløggu sum albógva seg framat, og teirra bakland eru familjur og ymsik sløg av samkomun.

Í bókini "Fjernforhør" segði Vaslac Havel seg vera ímóti flokkspolitiskari uppstilling til parlamentið. Tað sum hann ímyndaði sær, var eina skipan har einstaklingar, ið høvdu gjørt seg verdugar til fólksins álit, buðu seg fram.

Áðrenn Havel gjørdist politikkari, taldist maðurin millum frægu tjekkoslovatisku dramatikaranar. Kanska hevur hann hugsað sum so: Latið teatrini takað sær av operettunum og farsunum, so kunnu politikkararnir savna seg um at stjørna bý og landi.

ítróttur

Nr. 220 • mikudagur • 17. november 2004 • 78. árgangur • www.sosialurin.fo

**Flogbóltsstøður**
**Meistaradeild, kvinnur**

| | d | v | - | t | v sett | t sett | +/- sett | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Mjølnir | 4 | 4 | - | 0 | 12 | 3 | 9 | 8 |
| 2 TB | 5 | 4 | - | 1 | 12 | 6 | 6 | 8 |
| 3 KÍF | 4 | 3 | - | 1 | 9 | 5 | 4 | 6 |
| 4 Dráttur | 5 | 2 | - | 3 | 12 | 10 | 2 | 4 |
| 5 ÍF | 5 | 1 | - | 4 | 5 | 12 | -7 | 2 |
| 6 SÍ | 5 | 0 | - | 5 | 1 | 15 | -14 | 0 |

**Meistaradeild, menn**

| | d | v | - | t | v sett | t sett | +/- sett | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Mjølnir | 4 | 4 | - | 0 | 12 | 3 | 9 | 8 |
| 2 SÍ | 4 | 3 | - | 1 | 10 | 5 | 5 | 6 |
| 3 Fleyr | 4 | 2 | - | 2 | 8 | 6 | 2 | 4 |
| 4 Fram | 4 | 1 | - | 3 | 5 | 10 | -5 | 2 |
| 5 ÍF | 4 | 0 | - | 4 | 1 | 12 | -11 | 0 |

# TB heldur í vónini

**Tað stóð nógv á hjá TB, sum um vikuskiftið vendi hóttandi tapið til tepran sigur**

FLOGBÓLTUR
*Jákup Mørk*



*Tað hevur ikki borið nakað til hjá ÍF í ár. Enn eiga teir fyrstu stigini til góðar*

TB var favorittur, tá tær á heimavølli tóku móti Drátti um vikuskiftið. Fyri tað mesta hevur tað verið fatanin millum manna, at TB og Mjølnir eru favorittarnir í bestu kvinnudeildini í ár. Og tó at TB tapti greitt fyri júst Mjølni, so varð ikki roknað við, at tær skuldu fáa nakrar serligar trupulleikar av Drátti.

Men tær fingu tó skjótt annað at síggja. Dráttur legði bragdliga fyri, og tó at talan var um sera jøvn sett, so megnaðu tær at taka sær av teimum báðum fyrstu settunum. Og við 0-2 á talvuni var so eisini lagt upp til eitt óvæntað tap á heimavølli hjá TB.

Triðja settið gekk eisini javnt fyri seg. Dráttur royndi alt tað, sum tær vóru mentar, at avgera dystin við triðja settinum. Til tíðir tóktist tað eisini, sum skuldi hetta eydnast, men TB megnaði tó at ta taka settið. Og so kom av álvara vend í. TB tók sær sannførandi av fjórða settinum, og hóast seinasta settið ofta kann geva liðum nervar, so megnaði heimaliðið at halda høvdinum púra kalt, og soleiðis senda Drátt heim uttan stig. Uttan iva eitt vónbrot fyri gestirnar, tá tær nú vóru so nær sigrinum.

Í hinum dystinum í bestu kvinnudeildini hetta umfarið, vitjaði ÍF í Sørvági. Her hevur heimaliðið enn ikki fingið nakað stig, og tað gjørdu tær so heldur ikki hesaferð.

ÍF vann nevnliga ein tryggan 3-0 sigur, og enn tykist tað soleiðis, sum skulu tær hjá SÍ venja seg við spælið í bestu deildini.

## Øvuta søgan

Hjá monnunum var søgan hin øvuta, tá ÍF somuleiðis vitjaði í Sørvági. Her er tað ÍF, sum enn ikki hevur fingið nakað stig, og tað fingu teir so heldur ikki hesaferð.

Gestirnir vóru tó væl við í fleiri av settunum, men tá avgerandi bóltarnir vóru á skránni, so vóru tað kortini sørvingarnir, sum vóru hvassari, og hóast settúrslitini kanska ikki er so sannførandi, so var sigurin hjá teimum kortini ikki í vanda.

## Meistaradeild kvinnur

TB-Dráttur 3-2 (27-29, 21-25, 25-23, 25-16, 15-6
SÍ-ÍF 0-3 (11-25, 19-25, 20-25)

## Meistaradeild menn

SÍ-ÍF 3-0 (25-15, 25-23, 25-21)

**Skrivstovuhjálp**
**til Pf. Vágatunnilin**

Vágatunnilin sóknast eftir skrivstovufólki beinanvegin. Starvið er tíðaravmarkað til endan á august 2005. Arbeiðið fevnir um vanligar skrivstovuuppgávur við serligum atliti til innkrevjing.

Fólk, ið hava skrivstovuútbúgving, handilsútbúgving ella líknandi, og fólk ið eru von at starvast á skrivstovu, kunnu søkja.

Løn og setanartreytir annars verða ásettar eftir nærri avtalu. Fleiri upplýsingar fáast við at venda sær til Dávid Reinert Hansen á telefon 350 200 ella við at senda teldubræv til drh@tunnil.fo.

Umsóknir skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi týsdagin 23. november 2004. Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði.



Vinarliga sendið umsóknina til:

**Vágatunnilin p/f**
**Postboks 1010**
**110 Tórshavn**

VÁGATUNNILIN

Vágatunnilin pf. · Skansavegur 7 · Postboks 1010 · 110 Tórshavn · Tel 350200 · Fax 350201
www.tunnil.fo

**Útbjóðing**

Vi hesum verður partur av arbeiðinum at breiðka vegin millum Streymnes og Brúnna um Streym, boðin út í almenna lisitatión. Arbeiðið fevnir um avgrevstur av mold og uppfylling við gróti og skal hetta verða liðugt í seinasta lagi 31. desember 2004.

**Høvuðsnøgdirnar eru áleiðis:**
Avgrevstur av mold 12.000 m3
Uppfylling við gróti 13.000 m3

Lisitatiónin verður hjá Landsverki, Tinghúsvegi 5, Tórshavn, **týsdagin 23. november 2004, kl. 11.00.**

Ástaðarfundur verður mánadagin 22. november 2004, kl. 10.00, og møtt verður við húsið hjá Landsverki við Streymin.

Útbjóðingartilfarið kann bíleggjast frá 17. november 2004 til í seinasta lagi 19. november 2004, og verður útflýggjað móti einum veðhaldi til støddar 2.000 kr., ið verður at flyta á konto nr. 128.229.6 í Føroya Sparikassa ella á konto nr. 431.468.0 í Føroya Banka. Veðhaldið verður afturgoldið, um útbjóðingartilfarið er aftursent óskalað í seinasta lagi eina viku eftir lisitatiónina.

Landsverk, Tinghúsvegur 5, Postsmoga 78, Tórshavn, | Tel 311 333, Faks 314 986, lv@lv.fo, www.landsverk.fo

LANDSVERK byggir land

www.sansir.fo